# Ítróttarfelag Fuglafjarðar




# ÍF - AB

LANDSKAPPING

Leygardagin 20. september 2003

Kl. 16.00 í Fuglafirði

HAVSBRÚN

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**

# ÍF - AB

**16. umfar í landskappingini hjá**
**2. deild monnum**
**20. september 2003**

## Leikskrá 8

**Útgevari:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd:**
*Gunnvá Dam*
*Birgar Larsen*
*Janus Petersen*
*Steinbjørn í Lambanum*
*Rógvi Róin*

**Myndir:**
*Rógvi Róin*

**Kápumynd:**
*Veteranurin á ÍF-liðnum, Roy, hongur framvegis í. Her roynir hann seg við skoti undir venjing herfyri. Roy vísir, at dugur framvegis er í honum á miðvøllinum.*
*Mynd: Rógvi Róin*

**Prent:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting:**
*Rógvi Róin*



### ? HALDIÐ HØVDIÐ KALT....VIT HAVA

# FLEIRI MØGULEIKAR

Tað vóru ikki so fáir fuglfirðingar – bæði her og aðrastaðni kring landið – sum síðsta vikuskiftið fylgdu okkara monnum; eingin tó á Sevmýri. SMS´sini vóru mong, og tað frættist, at battarí á fartelefonin hjá Símun Fornagarð, longu var tómt áðrenn dysturin var hálvrunnin; tað sigur ikki so lítið um áhugan. Helst vóru tað eisini mong, sum vóru hørm um, at tey ikki høvdu melda seg til útferðina, sum Eivin og fótbóltsnevndin høvdu tikið stig til – eitt fínt initiativ, sum veðrið helst tileinkis-gjørdi – blaðstjórin er í hvussu er ein av teimum sum "ergra" seg!!! Spell, tí vit vildu óivað havt feira frálíka avrikið saman við tykkum á Tvøroyri og eisini tað kvøldið. Onkur var tó so glaður, at teir fóru til Havnar at taka ímóti liðnum, sum vann 2-5 á toppliðnum TB.

Tað er eingin ivi, at tað er rættuligur fótbóltsfepur í Fuglafirði í hesum døgum. Ikki tí, tað hevur tað verið ein stóran part av árinum, tí tað er ikki nøkur loyna, at úrslitini hava verið somikið góð í ár, at mong av okkum hava sæð liðið verða eitt av teimum, sum fór at kappast um besta plássið í deildini, og harvið luttøku í 1. deild komandi ár. Vit vóna, at hesin fótbóltsfepurin heldur; ikki bert í ár, men eisini komandi ár, líkamikið, hvussu útfallið av landskappingini í ár verður. Vit hava áðrenn dystin í dag tríggjar møguleikar at vinna pláss í bestu deildini. Fyrst ímóti AB, síðani ímóti LÍF í Leirvík meðan síðsti dysturin í ár er heima ímóti einum av okkara harðasta kappingarneyta, Sumba. –Men tað besta av øllum er, at vit kunnu avgerða alt sjálvir, og tað ætla vit okkum eisini; helst eisini áðrenn síðsta dystin í ár.

"Man skal smíða meðan jarni er heitt", var uppi og vendi í síðstu leikskránni, og beint nú er orðatakið rættuliga viðkomandi, og tí loyva vit okkum at halda fast í hesum eina tíð afturat. –Enn hevur felagið ikki smíða tað stóra, men vit vita, at tey eru í ferð við at leggja til rættis og fáa ymiskt upp á pláss til komandi ár, havandi í huga, at vit enn ikki eru fluttir upp. -Vit halda, at hetta kortini er upp á pláss, tí man má arbeiða út frá verandi støðu, og hon er tann, at vit eru tvey stig - av nýggju møguligum - frá uppflyting. Tit mugu ikki steðga hesum fyrireikingararbeiði, sjálvt um tað ikki

*(Framhald á bls. 4)*





### UPPFLYTARARNIR

# AV ARGJUM VITAJA Í DAG



*Leikararnir kunnu saktans slappa av eftir venjingina hóskvøldið. Innsatsurin hevur verið góður og leikferðin høg alla vikuna. Lat okkum vóna, at tað sama verður galdandi í dag. F.v. Jan, Fritleif, Hanus og Eyðun.*

Gestirnir í dag vóru eitt av teimum liðunum, sum áðrenn kappingina vórðu spáddir at vera millum liðini, sum fóru at kappast um uppflyting. Leikaratilfarið var gott, samstundis sum umstøðurnar at leika fótbólt á Argjum eru góðar. –Men argjamenn mugu bert ásanna, at tað ikki altíð gongur, sum spátt verður. Rættuliga tíðliga í kappingini fóru teir at seta stig til, og tá vit, TB og Sumba vunnu okkara dystir, kláraðu argjamenn ikki rættuliga at fylgja við. Men so við eitt vóru teir aftur í toppinum, og tá ið teir vunnu á Sumba fyri trimum vikum síðani, vóru teir aftur við í kappingini. Men Sumba kærdi dystin, og fekk viðhald og harvið varð AB dømt at tapa dystin, og harvið ruku eisini vónirnar um 1. deildarfótbólt fyribils.

Hóskvøldið høvdu vit venjaran hjá AB, Sámal Erik Hentze, í telefonini. Vit spurdu hann um vónirnar til dystin í dag. -Vit fara inn fyri at vinna, tað er eingin ivi. Um vit ikki vinna dystin í dag, fer okkurt av hinum liðunum framum, og so er heiðursmerkjapláss útilokað, sigur Sámal Erik. Vit fara eisini at spæla fyri møguleikanum um uppflyting ella í øllum førum uppflytingardyst ímóti nr. 9 í 2. deild, og um hetta skal lata seg gera, mugu vit vinna allar dystirnar, sum eftir eru, sigur Sámal Erik.

Sámal Erik dylir ikki fyri, at teir høvdu vænta meira av kappingarárinum í ár. -Vit høvdu vænta meira, men m.a. tí at vit hava havt ov stórar útskiftingar í leikarahópinum, er úrslitið vorðið sum tað er. Eg havi nýtt íalt 26 leikarar í ár, og tað er ov nógv, um liði skal samanspælast, vísir Sámal Erik á. -Man sigur, at í mesta lagi 20 leikarar skulu hava leikt við einum liðið í einum kappingarári, um liðið skal røkka úrslitum. Vert er eisini at nevna, at bert tveir spælarar hava leikt allar dystirnar. Hinir hava leikt úr 9 og niður í 4 dystir, sigur Sámal Erik. Umframt óstøðuga leikarahópin, hava vit eisini havt seks leikbann í ár. Hetta er alt hagtøl, sum tala ímóti.

Sjálvt um tað ikki hevur gingist AB sum vænta, kunnu vit bert staðfesta, at liðið, sum vitjar okkum í dag, er rættuliga gott. Teir hava nógvar góðar og evnaríkar leikarar, sum heilt vist fara at gera seg galdandi í bestu

*(framhald á bls. 26)*

RÒGVI RÒIN SKRIVAR:

# FER ÍF Í ÁR AT SKIPA FYRI ÁRSVEITLSU?

## Nú fótbólskappingin er við at enda, eru flestu feløgini í landnum spakuliga farin at hugsa um at enda árið við eini veitslu. Vit spyrja, hvussu við okkum?

Nú er tann tíðin komin, har ymsu fótbóltsfeløgini kring landið fara at hugsa um ársveitslur. Ikki tí, fótboltskappingin er ikki av enn, men gjarna skal ikki verða ov langt fráliðið, áðrenn hesar veitslur verða hildnar. –Vit vita, "man skal smíða meðan jarni er heitt".

Vit eru nokk ikki tað felagið, sum hevur hildið flestu ársveitslurnar fyri leikarum, limum og bygdafólki sum heild. Tvørturímóti eru vit helst tað felagið, sum hevur gjørt minst við slíkt. Um tað er felagið, sum hevur skuldina av hesum, ella tað er móttøkan millum bygdafólki, sum hevur gjørt, at fáar fótbóltsveitlsur hava verið í Fuglafirði, skal verða ósagt.

Hví ikki í ár bróta hesar keðiligu "traditiónirnar" og skipa fyri eini ársveitslu (ella fótbóltsveitslu, um tit heldur vilja kalla tað tað). – Líkamikið endaliga úrslitið í ár, so hevur felagið nógv heiðurlig úrslit at vísa á í ár, og sum vit fuglfirðingar eiga at vera stoltir av. – Flogbóltsleikararnir – bæði menn og kvinnur – vístu í vár, at tey eru tey bestu í Føroyum. Í fótbóltinum hevur higartil gingist væl. – Besta liðið liggur til uppflyting í bestu deildina, meðan næst-besta liðið eisini hevur klára seg væl. Eisini fleiri av hinum liðunum hava góð úrslit at vísa á.

Beint nú slepst nokk ikki undan at ásanna, at ein møgulig árs- ella fótbóltsveitsla helst er treyta av endaliga úrslitinum hjá besta fótbóltsliðnum hjá okkum. Vit liggja sera væl fyri, men enn er einki avgjørt. Og vit skulu ikki leggja størri trýst á leikararnar enn neyðugt. Teir hava trý umfør at vísa okkum og Føroya fólki, at teir hava uppiborið eitt pláss í bestu deildini. Men kortini eigur ÍF í ár at skipa fyri eini ársveitslu. Hendan eigur at vera hildin sum skjótast – í øllum førum meðan fótbóltsfepurin er í hæddini, tí annars verður tað ikki til nakað. Spurningin um ársveitlsuna lata vit inntil víðari standa ósvaraðan, men helst ikki ov leingi! Góða veitslu.....

TAÐ HALDA VIT

*(framhald frá bls. 2)*

eydnast í dag. Slíkt arbeiði krevur tíð, og tað hava vit nú, men um tvær vikur er hendan tíðin knappliga knøpp. Tey feløgini, sum longu nú ikki eru farin í gongd við fyrireikingarnar til komandi ár, fara tað um heilt stutta tíð. –Tey sum bíða longri, verða ov sein.

At enda vilja vit minna tykkum øll á, at um tað ikki verður í dag, at vit tryggja okkum luttøku í bestu deildini, so eru tvinnir møguleikar eftir. Stuðli tí heldur liðnum, og vit røkka málinum.
Góðan dyst!



## TÚ




**Navn:** Rúni Petersen
**Føðingardagur:** 08.08.1979
**Føðistað:** Fuglafjørður
**Starv:** í læru á Blika
**Pláss á vøllinum:** áleypari á beinkinum:)
**Hædd og vekt:** 183 cm. og 85 kg.
**Yvirtrúgv:** bindi ongantíð lissurnar hjá Jan áðrenn dyst
**3 orð sum lýsa teg:** Frískur, illsintur og tolin
**Torførast mótstøðumaður:** Viggo
**Frítíðarítriv:** fótbólt, spæli formaður og royni at mála húsini
**Vónir fyri 2003:** vinna 2. Deild ruddiliga og varðveita okkara stjørnur í ÍF

## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** Haldi sum 17 ára gamal undir Petur S.
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Tað mundi vera uml. 1985
**Aðrar ítróttargreinar:** badminton og flogbólt
**Minnigarríkasti dystur:** steypadystin ímóti B36. Eg fekk reyða kort og vit vóru aftanfyri 2-0, men vunnu dystin 3-2
**Størstu fótbólstliga ávirkan:** Kundi veri Fróði Georg
**Besti fótbóltsleikari:** Zinedine Zidane
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** badminton
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** millum 2 mál
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** allan venjing uttan bólt
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Martin, Eyðun, John, Finnur, Fróði G., Sámal Petur, Birgir, Rúni, Árni, Henry (ikki Thierry), Atli - bestir upp á ein "spesiellan" máta

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** seyðarhøvd og ein køld veðr
**Slag av tónleiki:** góður rokkur
**Sjónvarpssending:** Godness Gracius Me
**At slappa av:** hyggja eftir filmi saman við damuni
**Troyggja nr.:** nr. 9
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Zidane
**Sjónvarp/filmstjørna:** Kevin Spacey
**Besta bók/blað:** Lord of the Rings



ONLY

VERO MODA

>> vælkomin í KATO

Fuglafjørður




Fysioterapiviðgerðarstova

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur

**Lastvognskoyring**




**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

**Kári Zachariassen**

**530 Fuglafjørður**

**tel. 444 245 ella 217 245**

**Føroya Shell**

| | |
|---|---|
| Streymoy | 34 74 00 |
| Norðoyar | 45 77 11 |
| Eysturoy | 44 87 11 |
| Vágar | 33 27 11 |
| Sandoy | 36 17 11 |
| Suðuroy N | 37 27 11 |
| Suðuroy S | 37 47 11 |








**HYDRAULIK**
**RÁÐGEVING**
**VERKÆTLANIR**
**ÍSETANIR**
**UMVÆLINGAR**
**MASKINUMVÆLINGAR**
**SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING**



**Sølu-og tænastuumboð fyri:**

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispøl)
- Rapp Hydema Syd (garna- og línuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brenniolju og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (idnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

**Á goymslu:**

**Hydr, slangur og fittings, hydr, rør og fittings, (manøvri- og kúluventilar, kúlu-leigir, hydr. filtur, smyrji- og brenniolju-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.**

**KJ-HYDRAULIK**

P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com



## Salong Yndi

530 Fuglafjørður
Tel. 444 490











## Bílegging av pizza



www.pizza.fo

Team 85 358000

P.O. Box 97
FO-110 Tórshavn
Tel +298 350 000
Fax +298 350 001
hotel@hotel.fo
www.hotel.fo

*Hotel Tórshavn er hotellið í miðbýnum. Hotel Tórshavn virkar bæði sum hotel og sum sjómansheim. Á hotellinum eru allir hentleikar - frá gisting til skeiðsvirksemi og frá lættum kosti til fínan kost. Hotellið hevur 41 seingjarpláss. 20 starvsfólk arbeiða á hotellinum.*






FONN FLOG

FO-700 Klaksvík · Tel. 456363 · Fax 457373 · fonnflog@fonnflog.fo













# SV - TRANSPORT

**Allur flutningur við:**

**Lastbilum | Kranabilum | Trailarum**

**Dumparum | Bingjubilum**

**530 Fuglafjørður** **tel. 44 41 77**





**Tilfar til umvælingar, ábøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

**Fuglafjarðar Timburhandil**
tel. 444 126








Fiskamjøl



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

Fiskalýsi



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

Fiskafóður



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

Uppisjóvarfiskur



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**
Havsbrún Ltd. · 530 Fuglafjørður
tel. 444 100 · fax 444 160
havsbrun@havsbrun.fo
www.havsbrun.fo



## Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:

- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
**v. Jørmund L. Juul** (verkfrøðingur & húsasmiður)

☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo



CLIMACOOL RESPW
800⁰⁰



REKORD
700⁰⁰



A CUB.TWIN STRI
1.400⁰⁰



SUPERSTAR II
700⁰⁰

**P/F THOMAS DAM**
ÍTRÓTTUR á Glyvrum - Glyvravegur - Glyvrar - tel.44 73 99 - fax 44 73 97



# Fuglafjørður



býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak



býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala



**Stutt sagt:**



býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar kommuna**
tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo

## Fuglafjarðar Keypsamtøka

Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895

## Alfa Seafood Sp/f

Box 10 • FO-530 Fuglafjørður • Tel. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 • E-mail: alfa@post.olivant.fo



Gardintoy
Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

**Profa Farvur**

v/Petur Gaardlykke • 600 Saltangará • tel. 44 91 49

## FAROE SEAFOOD

Fiskavirkið í Fuglafirði • Postboks 53 • tel. 444 500 • faks 444 580

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar takkar øllum lýsarum fyri dyggan stuðul.

Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Postboks 94 - 530 Fuglafjørður - tel./fax 444 636




**Lamineraðir frontrútar til øll bilmerkir**



# FLÜGGER

- Dygdarmáling til lágan prís
- Lyklar, innramming, gólvtilfar og fiskireiðskap til smábátin

*Tasjan á Bugnum*
530 Fuglafjørður
tel. 44 50 44
fartel.: 22 11 09



# BAADER®

Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu.

Nú umboða vit eisini Fomaco saltsproytur.

## P/F Petur Larsen






*Reiðari innan* *frakt-*
*& sandbátar*
*Krana- og*
*lastvognskoyring*
*Sandsøla*

**SANDGREVSTUR**

Stovnað 1949

530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921




B S

**P/F BOÐASTEINUR**
Bakkavegur 26
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
Tlf. +298 444800
Fax +298 444840
E-mail: alibo@post.olivant.fo




HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA



HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA

| | |
|---|---|
| UNDIRVATNSLJÓS | EL-MOTORAR |
| UNDIRVATNSKAMERA | EL-LUTIR |
| TRÁÐLEYST VIDEO SAMSKIFTI | FREKVENS UMFORMARAR |
| ALARMSKIPANIR | EL-TALVUR |
| PLC-STÝRINGAR | FYLGISVEINASJÓNVARP TIL SKIP |

**JT electric**

JT electric Ltd. Kambsdalur Faroe Islands Tel +298 474444 Fax +298 474445 jtelectric.com

## *Blómuhandilin*

# *Orkis*

### *625 Glyvrar*

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

***tel 44 82 89***
***fax 44 89 89***

## Danny Transport

**Tel. 31 91 92**

**Flutningur um allan heim!**

**Landsins størsta og besta úrval av ítróttarheiðursgávum**

- **Steyp**
- **Heiðursmerki**
- **Heiðursbrøv**
- **Toy við búmerki**
- **Streamers**
- **Klistrimerki**
- **Seruppgávur við gravering**

**Vit seta títt búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað**

**FA. EILIF ARGE**
**KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK**
**TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76**



## Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358








**Nissan Micra**

Tann nýggi Nissan Micra er ætlaður at skapa gleði millum fólk.

Tann nýggi Nissan Micra hevur til dømis minsta vendiradius í sínum flokki. Nýggi Micra hevur eisini mest framkomnu lásiskipan hugsast kann. Og tá ið tú setir bilin frá tær, lýsir hann tær heim. Vitjið hjá Nissan við Oyggjarvegin ella vitjið heimasíðuna www.nissan.fo



**P/F Meinhardt Arge**
við Oyggjarvegin
Tórshavn
tel. 345400 • fax 345401

## Bussar til øll endamál



*Serflutningur til rørslutarnaði*
*Bólkaferðir, bæði innan- og uttanlands*
*Ítróttarferðir, bæði innan- og uttanlands*
*Skúlabarnakoyring*
*Bygdaleiðir*
*Bussar frá 7 til 56 persónar*

Spf. AP Andreas Poulsen BUSSKOYRING
✆ 22 52 20 - 44 17 20

FO-513 Syðrugøta • e-mail:pouand@post.olivant.fo

*Heimavirkis søla og framsýning*

*Piddasa handil*

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

*Gallari Ríbarhús*

Opið er:
mán.-fr: 15.00-17.30
leyg.: 11.00-13.00

Tel. 444 427

GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71

**Altíð nýbakað breyð**

**Sunnumorgnar fæst breyð á hesum støðum:**
Statoil í Leirvík
Hjá Halluri í Gøtu
Statoil í Skálabotni
Statoil í Saltangará
Kiosk Vár í Saltangará
Statoil á Strondum

**Handilin er opin soleiðis:**
Má-Ley: 07.00-17.30
Sun: 08.30-10.30

BREYDMOLIN
530 Fuglafjørður - tel./fax 444 388



## Úrvalsbilar Spf.

- Søla av brúktum innfluttum bilum
- Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

www.bilar.fo

Bakkavegur • 530 Fuglafjørður • tel. 444 943 • fax 444 638 • Fartel. 281943

HeimaGreiðslan




Tú gert av hvar og nær. Við HeimaGreiðsluni er Sparikassin opin – har og tá tú ynskir tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

SPAR NORD CUP

## PILTARNIR HJÁ

# ÍF GOTT ÚRSLIT Í SPARD NORD CUP!



*Piltarnir hjá okkum avmyndaðir saman við einum liðið av Filipsoyggjunum á einum av mongu vallunum í Nørresundby, har kappingin Spar Nord Cup var hildin í juli mánaða.*

Í døgunum 21. – 28. juli vóru piltarnir hjá ÍF við í donsku kappingini Spar Nord Cup, sum hvørt ár verður hildin í Nørresundby í Danmark. Við í kappingini vóru uml. 700 børn og ung, bæði gentur og dreingir.
Ferðalagið, sum í summar fór til Danmarkar var rættiliga stórt, tí umframt piltarnar, sum vóru 12 í tali, vóru 11 foreldur, 6 systkin, 1 leiðari og 2 venjarar við á ferðini.
Í innleiðandi bólkinum vóru fýra lið: ÍF, Lindholm úr Nørresundby, Lisleby úr Noregi og eitt lið úr Filipsoyggjunum.

Dystirnir í bólkaspælinum gingu væl, og piltarnir hjá ÍF vunnu bólkin. Semifinaluna spældu teir móti einum týskum liði, sum vann 5 – 1. ÍF liðið kom tí at spæla um 3. og 4. plássið móti liðnum úr Filipsoyggjunum, og her vunnu ÍF- piltarnir eftir ein harðan og strævnan dyst 5 – 4 og fingu tí bronsuheiðursmerki.

Ferðin í Danmark var góð, bæði tá hugsað verður um sjálvan fótbóltin og um samanhaldið. Dreingirnir spældu fimm dystir og vandu eisini nakrar ferðir. Øll búðu saman á einum skúla og ótu í eini ítróttarhøll, sum var við sama skúlan.
Umframt at spæla fótbólt var ferðalagið eisini og vitjaði í Djóragarðinum í Aalborg og í Fårup Sommerland.

Hetta er ikki fyrstu ferð at ÍF hevur havt lið við í hes kapping. Í fjør vóru gentu 12-14 ár við í kappingini og fyrrári vóru dreingirnir, sum nú eru smádreingir. Øll liðin hava latið væl at kappingini, so vónandi fer ÍF framhaldandi at lata lið sleppa at royna seg uttanlands.

**NÆSTA LEYGARDAG LEIKA VIT ÍMÓTI LÍF Í LEIRVÍK. MØTIÐ FJØLMENT OG KOYRIÐ Á OKKARA MENN!**




# Stuðlið ÍF

## Keypið lutaseðlar til heimadystirnar

**Til teir seinastu tríggjar heimadystirnar hjá 2. deild er møguleiki at keypa lutaseðlar. Drigið verður um 3 vinningar til hvønn dyst. Til tann seinasta dystin móti Sumba leygardagin 4. oktober verður eisini drigið millum allar seldar seðlar um eitt gávukort á 1.000,- frá P/F Haraldsen.
Lutaseðlarnir kosta kr. 5,- fyri hvønn, og verða seldir í sølubúðini í ovaru hæddini, samstundis sum Helena fer at selja kring vøllin.**
***Minnist til: goymið seðlarnar!!***

## Vinnararnir seinast:

**Sodavatn, seðil nr. 38312**
**Gávukort frá Shell, seðil nr. 38031**
**Gávukort frá Muntra (døgurði fyri tvey), seðil nr. 38319**


DYSTURIN Í DAG

*(framhald av bls. 3)*
deildini, antin so ella so. Tí skulu vit verða varnir í dag. Tað er eingin orsøk at leypa framav, bert tí vit hava brúk fyri fleiri stigum. –Sigfríður er "ekspertur", tá ið tað kemur til tað taktiska, og hann veit akkurát, hvussu hann skal fara við leikarunum. –Hann fer ikki at leggja trýst á teir í dag, og heldur ikki teir báðar komandi dystirnar. Hann fer at vísa á, at tað er og skal vera stuttligt at leika fótbólt, sjálvt um tað ræður um at vinna. Vit hava sæð fleiri av dystunum í seinnu hálvu, at menn hava verið fjáltursstungnir. Men á Sevmýri síðsta vikuskiftið sást eitt hamskift ÍF lið, tá tað kom til uppspæl og møguleikar. Helst hevði venjarin onkusvegna lætt eitt trýst - sum ofta kemur til sjóndar, tá ið eitt lið liggur í toppinum - av herðunum á leikarunum. Teir vórðu meiri frígjørdir enn vanligt. –Teir tordu at spæla fótbólt, og úrslitið varð hareftir. –2-5 ímóti nr. 2 í 2. deild á útivølli, tað sigur ikki so lítið.

Í dag er trýstið ikki so stórt á okkara leikarum. Teir skulu gott nokk hava tvey stig afturat av íalt 9 møguligum, um teir sjálvir skulu avgerða kappingina. Samstundis skulu bæði Sumba og TB vinna allar sínar dystir. Tí skulu leikararnir aftur í dag fara inn á vøllin, at hava tað stuttligt. -Tað skal vera stuttligt at spæla fótbólt, og síggja leikararnir soleiðis upp á tað í dag, so vinna vit dystin.

Allir leikararnir eru tøkir til dystin í dag, og tí verður liðið tað sama sum á Sevmýri síðsta vikuskiftið. Á beinkinum vera Roy, Fritleif, Rúni, Høgni og Sverri.

AT STYTTA SÆR STUNDIR VIÐ

# TIPS 13



## VEDDA OG VINN VIÐ BIRGARI OG JANUSI

Í kappingini "vedda og vinn við Birgari og Janusi" vinnur besti tipparin í einstøku kappingunum ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Umframt vikuvinningin sleppa allir 9 vinnararnir út at bowla saman við 1. liðsleikarunum eftir kappingina. Vinnararnir eru eisini við í lutakastinum um ein APEX-flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

Fyri at luttaka og vinna, skalt tú seta kross í tann rútin (1, X ella 2), ið tú heldur/veitst eru rættir. Skrivað navn, bústað og tlf.nr. og lat hann inn í ovaru hædd í ítrottarhúsinum undir ella beint eftir dystin. Tann ella tey, sum hava svara flest spurningum rætt, eru við í lutakastinum um sodavatns-kassan. Góða eydnu!

*Røttu svarini til spurningarnar hasaferð fært tú at vita í næstu leikskrá. Svarini og vinnarin frá seinast eru á bls. 31.*

Navn:

Bústaður:

Telefon:

*TIPS 13 seðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 min. eftir loknan dyst.*

### ÍF TIPS 13 (set x í rætta rútin)

| 8. UMFAR | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur venjarin hjá Skála? 1. Pauli Joensen X. Jóhan Nielsen 2. Eugin Voda | | | |
| 2. Hvuusu eitur nýggi landsliðsleikarin hjá Føroyum? 1. Claus Bech Jørgensen X. Atli Gregersen 2. Christian Lamhauge Holst | | | |
| 3. Nær er LÍF stovnað? 1. 1928 X. 1932 2. 1936 | | | |
| 4. Hvat torir Trúgvi ikki? 1. Inn á vøllin við læknataskuni, tá spælari er skaddur X. Í býin áðrenn dyst 2. At koyra lastbil | | | |
| 5. Ayersome Park *VAR* heimavøllur hjá? 1. Sunderland X. Derby County 2. Middelsborough | | | |
| 6. Hvar er Lothar Matthaus venjari? 1. Austria Wien X. FC Koln 2. Partizan Belgrad | | | |
| 7. Hvørjum felag hevur Pierre van Hooijdonk *IKKI* leikt fyri? 1. Boavista X. Benfica 2. Celtic | | | |
| 8. Á hvørjum landsliðið leikar Jose Clayton? 1. Tunesia X. Marokko 2. USA | | | |
| 9. Frá hvørjum felagi keypti Real Madrid Ivan Helguera? 1. Betis X. Espanyol 2. Alaves | | | |
| 10. Áðrenn dystar byrjan verður Lutakast, tað liðið í vinnu lutakastið skal velja 1. Bólt X. Síðu 2. Ella avger sjávt | | | |
| 11. Hvussu nógvar HM kappingar hava verið? 1. 15 X. 16 2. 17 | | | |
| 12. Hvat lið vann "Cup Winners Cup" í 1991? 1. Man Utd X. Tottenham 2. Arsenal | | | |
| 13. Hvussu nógv mál skoraði Ian Rush fyri Liverpool í sínum 616 dystum? 1. 312 X. 325 2. 337 | | | |

Föroya Bjór ATLANTIC AIRWAYS



Klipp ella skræð

# HAGTØL & FAKTA

### STØÐAN 2. DEILD MENN - 19. september

| Lið | Dyst | V | J | T | Mál | Stig | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. ÍF | 15 | 11 | 3 | 1 | 33-12 | 36 | 7-0-0 | 4-3-1 |
| 2. TB (N) | 15 | 9 | 2 | 3 | 43-17 | 29 | 7-0-0 | 2-2-3 |
| 3. Sumba | 15 | 8 | 4 | 3 | 30-13 | 28 | 4-3-0 | 4-1-3 |
| 4. AB (U) | 15 | 6 | 5 | 4 | 26-20 | 23 | 4-2-2 | 2-3-2 |
| 5. KÍ | 15 | 7 | 1 | 7 | 31-41 | 22 | 6-0-2 | 1-1-5 |
| 6. VB | 15 | 6 | 2 | 7 | 28-19 | 20 | 4-2-2 | 2-0-5 |
| 7. B36 | 15 | 5 | 3 | 6 | 22-19 | 18 | 3-1-4 | 2-2-2 |
| 8. LÍF | 15 | 5 | 1 | 9 | 20-39 | 16 | 2-1-5 | 3-0-4 |
| 9. B71 | 15 | 4 | 2 | 9 | 18-22 | 14 | 3-2-2 | 1-0-7 |
| 10. B68 (U) | 15 | 2 | 1 | 12 | 9-54 | 7 | 2-1-4 | 0-0-8 |

### LEIKARAHAGTØL 2. DEILD MENN 2003:

| Nr. | Leikari | D | Min | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fróði Poulsen | 11 | 990 | | | | 1 | -11 | 65 |
| 2 | Áki Petersen | 14 | 1260 | | | | | 1 | 361 |
| 3 | Jan Skoradal | 15 | 1290 | | 1 | 1 | | | 58 |
| 4 | Viggo Johannsen | 15 | 1350 | | | | | 1 | 91 |
| 5 | Heini Heinason | 9 | 314 | 2 | 6 | | | 4 | 19 |
| 6 | Fritleif í Lambanum | 8 | 163 | | 8 | 1 | | 1 | 63 |
| 7 | Martin Hansen | 2 | 96 | | 1 | | | | |
| 8 | Sverri Ellingsgaard | 12 | 878 | 6 | 1 | 2 | | | 255 |
| 9 | Rúni Petersen | 5 | 99 | | 5 | | | 1 | 45 |
| 10 | Hanus Eliasen | 15 | 1257 | 4 | 1 | | | 7 | 400 |
| 11 | Eyðolvur R.-Petersen | 15 | 1287 | 5 | | 1 | | 3 | 184 |
| 12 | Árni Petersen | 7 | 484 | 2 | 2 | | | | 15 |
| 13 | Høgni á Lakjuni | 5 | 251 | 2 | 2 | | | 1 | 9 |
| 14 | Ken Bærentsen | 13 | 956 | 7 | 1 | | | 6 | 189 |
| 15 | Eyðun Ryggshamar | 9 | 281 | | 8 | 1 | | | 35 |
| 16 | Jákup Helgi Egholm | 4 | 360 | | | | | -1 | 4 |
| 17 | Høgni Zachariassen | 14 | 1260 | | | 2 | | 6 | 142 |
| 18 | Atli Petersen | 14 | 908 | 11 | 2 | 1 | | 1 | 239 |
| 19 | Roy Róin | 8 | 382 | 2 | 4 | | | 1 | 19 |
| 20 | John S. Thomsen | 11 | 882 | 3 | | 4 | | | 270 |
| 21 | Rógvi Róin | 1 | 83 | | 1 | | | | |

***FRÀGREIÐING:** D: Dystir; Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur; Inn: Dystir innskiftur; G: Gul kort; R: Reyð kort; M: Mál; Stig: í kappingini "ársins ÍF´ari"*

### Vert at vita

Dysturin í dag er tann næstseinasti heimadysturin. Næsta leygardag spæla vit grannauppgerð í Leirvík í monnunum hjá Boga. Næsti heimadystur - og samstundis seinasti dysturin í ár, verður leygardagin 3. Oktober ímóti Sumba.

3. deild á útivølli ímóti HB í dag; dysturin byrjaði kl. 15.00.

Næsta sunnudag spæla teir ímóti GÍ í Fuglafirði.

Um tú atkvøður í dag um, hvør er dagsins leikari, so ert tú við í lutakastinum um at vinna eitt lambskrov frá Haraldsen. Atkvøðuseðlar eru á síðu 30, ella tú kanst fáa teir í ovaru hæddini Ítróttarhúsinum undir og beint eftir dystin.

### Aðrir dystir í dag 2. deild

B71 - KÍ

B36 - LÍF

VB - TB

B68 – Sumba

### Dystir í 1. deild 21.09 - 16. umfar

Skála - VB

NSÍ - B36

HB - B68

GÍ - EB/Streymur

FS Vágar - KÍ

### Dystir í 3. deild 21.09 - 16. umfar

HB - ÍF

NSÍ - B36

GÍ - EB/Streymur

Skála - Royn

FS Vágar - TB

### Málskjúttar - 2. deild

| | |
|---|---|
| Kaj Roest, TB | 10 |
| Dan Mortensen, TB | 9 |
| Áki Mørk, B36 | 8 |
| Hanus Eliasen, ÍF | 8 |
| Eirikur Joensen, Sumba | 8 |
| Eyðun Samuelsen, AB | 7 |
| Allan Michelsen, TB | 7 |
| Høgni Zachariasen, ÍF | 6 |
| Ken Bærentsen, ÍF | 6 |
| Pætur Dam Jacobsen, AB | 6 |

# ÁRSINS ÍF´ARI 2003

## HANUS BESTUR SEINAST... OG FREMSTUR SAMANLAGT



Í trygga 4-1 sigrinum ímót KÍ næstseinasta vikuskiftið valdu áskoðararnir Hanus at vera besta leikarin. Nú er hann fremstur í kappingini um at gerast ársins ÍF'ari. Fyri at vera bestur seinast fær hann ein ein døgurða-bita fyri tvey frá Pól á Muntra. Vit ynskja honum tillukku.

***Leggið til merkis!!*** Tað eru bert áskoðarar til dagsins dyst, sum kunnu atkvøða, og tað er bert ***ein*** atkvøðuseðil pr. áskoðara. Er tað onkur sum letur fleiri atkvøðuseðlar inn, verður bert tann eini tikin við.

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig.

Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttar-húsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

**Atkvøðutal**

| | ÍF-KÍ | Íalt |
|---|---|---|
| Hanus Eliasen | 99 | 400 |
| Ken Bærentsen | 47 | 189 |
| Eyðolvur R.-Petersen | 38 | 184 |
| Áki Petersen | 33 | 361 |
| Sverri Ellingsgaard | 30 | 255 |
| Eyðun Ryggshamar | 24 | 35 |
| Viggo Johannesen | 24 | 91 |
| Fritleif í Lambanum | 16 | 63 |

## Atkvøðuseðil

ÍF - AB, 20. september 2003

Dystur: ______________

Nr. 1 (5 stig): ______________________
*Leikari*

Nr. 2 (3 stig): ______________________
*Leikari*

Nr. 3 (2 stig): ______________________
*Leikari*

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: ______________ Tel.: ______________

**VINNINGAR**

- Ársins ÍF'ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.




Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen.

HARALDSEN
- títt keyp -





# SØLUBÚÐ Í OVARU HÆDDINI Í ÍTRÓTTARHÚSINUM

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. Liðnum, eru aftur í ár til dystin fús. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, køkur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til beint eftir dystin. Tað er eisini í sølubúðini, at tey, sum atkvøða um ársins ÍF'ara og tey sum gita í kappingini ÍF TIPS 13, skulu lata seðlarnar inn.

Sjálvt um hølisviðurskiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisni í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjarin fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin.



## ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini

Vinnarin seinastu ferð gjørdist Marta Thomsen við 9 røttum. Hon vann við lutakasti ímóti, ja gita: Ólavi Larsen. Fyri at vera besti tipparin fær Marta ein sodavatnskassa frá Føroya Bjór. Tillukku við tí. Hon sleppur somuleiðis út at bowla við 1. liðshópinum seinni í heyst, og so er hon eisini við í lutakastinum um Apex-flogferðaseðilin frá Atlantic Airways.

Røttu svarini til teir 13 spurningarnar seinast eru:

| ÍF TIPS 13 - Spurningar og svar - 7. Umfar: | Tekn: | Svar: |
|---|---|---|
| 1. Hvør er venjari hjá EB/Streymi? | 2 | ***Piotr Krakowski*** |
| 2. Hvør leikari hevur skotid flest mál fyri føroyska landslidid? | 1 | ***Todi Jónsson*** |
| 3. Hvussu eitur heimavøllurin hjá VB? | X | ***Vesturi á Eiðinum*** |
| 4. Hvussu eitur nýggja felagi hjá Jákup Mikkelsen? | 1 | ***Partick Thistle*** |
| 5. Hvussu nógv systkin hevur Trúgvi? | X | ***Tvey*** |
| 6. Hvar er Rudi Assauer venjari? | 1 | ***Schalke 04*** |
| 7. Hvar hevur Roberto Mancini _ikki_ spælt? | 2 | ***Monaco*** |
| 8. Hvat fyri landslid umbodar Sasho Petrovski? | 2 | ***Australia*** |
| 9. Hvør er toppskjútti í ensku 3. división (eftir 5 dystir)? | 1 | ***Lee Trundle, Swansea*** |
| 10. Hvussu eitur heimavøllurin hjá Sevilla? | X | ***Ramon Sánchez Pizjuán*** |
| 11. Hvør er týski venjarin hjá Partizan Beograd? | X | ***Lothar Matthaus*** |
| 12. Brotssparkl! Høgni Z. ger seg kláran at skjóta hetta brotssparki, men tá dómarin floytar rennur Áki inn í brotsparksteigin og langar til!! Bólturin endadi hjá Jákup Frants... Hvat dømur dómarin? | 2 | ***Umspark (og kann geva gult kort til Áka)*** |
| 13. Hvussu nógvar dystir spældi Eric Cantona á franska A-landslidnum? | 2 | ***43 dystir*** |

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**

***Aðalnevndin:***
Formaður
Rúni Petersen, tel. 215887
2. formaður
Høgni á Lakjuni tel. 444418
Peningarøkil:
Linda Joensen, tel. 445132
Skrivari:
Hildigarð Eliasen, tel. 444052/228771

***Fótbóltsdeild:***
Hildigarð Eliasen tel. 444052
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Ólavur Larsen, tel. 224659
Mortan Nónsgjógv
Atli Petersen, 444 018

***Venjarar:***
***2. deild:***
Sigfríður Clementsen, tel. 31 76 59
***3. deild:***
Báðrur Mortensen, tel.
***4. deild:***
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
***Old Boys:***
Sonni Jensen, tel. 444 975
***Unglingar:***
Birgar Larsen, tel. 22 10 37
***Dreingir Ø.:***
Janus Petersen, tel. 26 43 99
***Smádreingir Ø.:***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Smádreingir 1/2 vøllur***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Piltar 1/2 v a-b.:***
Hanus Eliasen, tel. 22 17 52
***Smápiltar:***
Atli Petersen, tel. 26 82 95
***Gentur:***
Durita Djurhuus, tel. 44 50 24
***Smágentur:***

***G.10-12 ár:***
Jónfríð Joensen, tel. 254170
***Yngst:***
Hanna Poulsen

# ÍF

1. Fróði Poulsen
2. Áki Petersen
3. Jan Skoradal
4. Viggo Johannesen
5. Heini Heinason
6. Fritleif í Lambanum
7. Martin Hansen
8. Sverri Ellingsgaard
9. Rúni Petersen
10. Hanus Eliasen
11. Eyðolvur R. Petersen (liðsk.)
12. Árni Petersen
13. Høgni á Lakjuni
14. Ken Bærentsen
15. Eyðun Ryggshamar
16. Jákup Helgi Egholm
17. Høgni Zachariassen
18. Atli Petersen
19. Roy Róin
20. John S. Thomsen

Venjari: Sigfríður Clementsen
Hj.venjari:
Liðleiðarar: Trúgvi Nesá
Tórstein Joensen

# AB

___ Magni Thomsen
___ Egin Høgnesen
___ Karl Leonsson
___ Magnus Jacobsen
___ Svenning Hansen
___ Flóvin Jespersen
___ Bogi Midjord
___ Símun Hansen
___ Johnny Samuelsen
___ Óla Hendrik av Fløtum
___ Bogi Johannesen
___ Jan B. Jørgensen
___ Eyðun Samuelsen
___ Pætur Dam Jacobsen
___ Hans Jørgen Djurhuus
___ Bernhard H. Petersen
___ Jónsvein Bærentsen
___ Eyðun Dalsgarð

Venjari: Sámal Erik Hentze
Hj.venjari:
Liðleiðari: Tórálvur Stenberg

## Dómarabólkur:

Dómari: Petur Hans Joensen, KÍ
Hjálpardómarar úr KÍ

## Bóltsponsorur:

Snikkarakjallarin JBS-Træ
Fløtugerði 34